# Føroyar taptu fyri finnum

**FÓTBÓLTUR** Fyrsti venjingardysturin hjá A-landsliðnum var í gjár ímóti finska meistaraliðnum, HJK Helsinki, sum vann 3-1. Arnbjørn T. Hansen skoraði føroyska málið

Hilmar Jan Hansen




*Arnbjørn T. Hansen og hinir á A-landsliðnum gjørdust ov stuttir í fyrsta venjingardystinum, sum var í gjár ímóti finska meistaraliðnum, HJK Helsinki*

*Mynd: FSF*

Í hesum døgum er føroyska fótbóltslandsliðið hjá monnum á venjingarlegu í Malaga, og sum vant, verða spældir venjingardystur ímóti feløgum, sum eisini eru á venjingarlegur har. Tann fyrsti av hesum var í gjár á Marbella-leikvøllinum ímóti finska meistaraliðnum, HJK Helsinki.

Finnarnir fingu eina sera góða byrjan, tí ikki var meira enn eitt korter farið, so vóru teir á odda 2-0. Fyrst skoraði Akseli Pelvas við einum góðum skoti í fimta minutti, og tá eitt korter var farið, fekk HJK Helsinki eitt brotsspark, sum Teemu Pukki setti í netið.

Finsku meistararnir høvdu munin fyri steðgin, men 2-0 leiðslan fekk teir so líðandi at slaka nakað, samstundis sum føroyska liðið tók seg fram, so tað í seinna hálvleiki var rættiliga javnt. Spælt var við lív og sál, og sum skilst, hildu finnar dystin vera á nøkulunda sama stigi sum ein vanligur dystur í bestu finsku deildini.

### Arnbjørn skoraði

Arnbjørn T. Hansen, ið var toppskjútti í landskappingini í fjør, gjørdi nógv um seg í føroyska álopinum, og hann fekk eisini minkað um munin, tá eitt gott korter var eftir. Ein annan stóran møguleika fekk hann eisini, tá hann gjørdist leysur við HJK-málverjanum, men fekk tó ikki mál.

Í staðin gjørdist tað Berat Sadik, ið kundi økja um finska sigurin sjey minuttir fyri tíð, tá hann skoraði til endaliga úrslitið, 3-1. Yvirhøvur vóru finnarnir skjótir og kropssterkir, so unga føroyska manningin fekk seg rættiliga roynda í hesum fyrsta dystinum.

Longu í dag er aftur ein venjingardystur á skránni hjá A-landsliðnum, sum spælir ímóti Malaga, og fríggjadagin verður spældur venjingardystur ímóti landsliðnum hjá Gibraltar.

Føroyska liðið: Meinhard Joensen – Jónas Þór Næs, Jóhan T. Davidsen, Pól Jóhannus Justinussen, Erling Jacobsen – Rógvi Poulsen, Levi Hanssen, Justines R. Hansen, Christian R. Mouritsen, Símun Samuelsen – Arnbjørn Hansen. Inn komu: Bogi Løkin, Hjalgrím Elttør, Hallur Hansson, Øssur Dalbúð.

*hilmarjan@sosialurin.fo*

# Steypavinnarar í Gundadal

**FÓTBÓLTUR** Lutakast hevur verið um, hvussu spælast skal í ársins útgávu av kappingini um Løgmanssteypið

Hilmar Jan Hansen

Ofta hevur verið funnist at, at eingin styrkismeting er av liðunum í steypakappingini, so sleppast kann undan, at fleiri av annars bestu liðunum ov skjótt mugu siga kappingini farvæl. Men framvegis er bara styrkismeting, tá umræður at finna liðini til innleiðandi umfarið.

Har verða spældir tríggir dystir millum lægri lið, og teir dystirnir verða spældir leygardagin 26. mars. Tá so fyrsta umfar verður spælt leygardagin 2. apríl, eru øll liðini tey bestu liðini eisini við.

EB/Streymur, ið vann steypakappingina í fjør, skal spæla sín fyrsta dyst á útivølli ímóti B36. HB og Víkingur eru onnur av frægaru liðunum, ið møtast, og eisini tekur NSÍ ímóti B71.

Annars eru allir hinir dystirnir í fyrsta umfari soleiðis, at liðini í Vodafonedeildini møta lægri liðum. So fæst at síggja, hvussu nógv av liðunum, sum á pappírinum skuldu verið betri, eru eftir í kappingini, áðrenn komið verður til fjórðingsfinalurnar, sum verða spældar mikudagin 4. mai.

Hálvfinalurnar verða spældar ávikavist hósdagin 19. mai og týsdagin 14. juni, og sjálv steypafinalan verður eftir skránni spæld fríggjadagin 5. august. Sostatt er líkt til, at enn eina ferð verður roynt at spæla finaluna í Klaksvík, samstundis sum Summarfestivalurin er.

*hilmarjan@sosialurin.fo*

### Løgmanssteypið 2011

**INNLEIÐANDI UMFAR**
Undrið - MB
TB - FF Giza
Skála - Royn

**FYRSTA UMFAR**
B68 - FC Hoyvík
HB - Víkingur
Undrið/MB - KÍ
NSÍ - B71
07 Vestur - FC Suðuroy
ÍF - Skála/Royn
B36 - EB/Streymur
AB - TB/FF Giza




*Føroysku fótbóltskvinnurnar megnaðu heldur ikki í seinasta dystinum á Malta at umseta kjansirnar til mál, og í staðin fyri at vinna bólkin, endaðu tær aftast*

*Mynd: kvinnufotbolt.com*

# Kvinnurnar snávaðu

**FÓTBÓLTUR** Tað verður eingin EM-undankapping hjá føroyska kvinnulandsliðnum á hesum sinni. Tað gjørdist greitt, tá liðið í gjár tapti 0-1 í evstu løtu ímóti Georgia – og tí endaði aftast í sínum bólki

Hilmar Jan Hansen

Kravið undan dystinum var heilt einfalt, at Føroyar skuldu vinna, samstundis sum Malta ikki tapti, tí so komu Føroyar víðari sum bólkavinnari. Malta kláraði sítt við 1-1 javnleiki ímóti Armenia, meðan føroysku kvinnurnar í evstu løtu taptu fyri Georgia.

Tað var eitt brotsspark langt inn í yvirtíðina, ið elvdi til tapið. Kortini kundi tað fyri so vítt gera tað sama, um tað gjørdist tap ella javnleikur, tí tað einasta, ið taldi, var ein sigur.

Av tí at Armenia samstundis fekk javnt, verður tað Armenia, ið fer víðari í EM-undankappingina sum bólkavinnari við fimm stigum. Malta er næstfremst við fýra stigum, meðan Georgia og Føroyar fingu trý stig. Føroyar endaðu enntá aftast av tapinum í síðsta dystinum.

– Vit skuldu heilt greitt havt vunnið henda dystin, tí vit stýrdu honum frá byrjan til enda. Longu í fyrsta minutti høvdu vit skot á stongina, og annars høvdu vit ivaleyst av kjansum, men tíverri vóru okkara spælarar ikki nóg kaldir, samstundis sum georgiski málverjin spældi væl, staðfestir landsliðsvenjarin, Álvur Hansen, ið harmast endaliga úrslitið av kappingini.

– Hetta er øgiliga skuffandi, tí vit hava havt allar kjansir til at gjørt tað betri. Samanumtikið hava vit spælt væl, serliga teir báðar seinnu dystirnar, men allíkavæl enda vit aftast, tí vit ikki hava dugað nóg væl at fingið mál burtur úr okkara mongu kjansum og royndum í øllum trimum dystunum.

Fótbóltskvinnurnar eru í dag á veg heimaftur, og ferðin er sera drúgv, tí hon byrjaði á Malta klokkan trý korter til fýra í nátt og tær lenda ikki í Vágum fyrr enn klokkan hálvgumniggju í kvøld.

*hilmarjan@sosialurin.fo*

### Føroyar - Georga
## 0-1 (0-0)

Ta'Qali, Malta, týsdagin 8. mars 2011 kl. 13.00
**0-1: Lela Chichinadze, 95. (br.)**

**Føroyar:** Randi Wardum – Paula Mikkelsen, Bára Skaale Klakstein, Ragna Patawary, Sigrið Jacobsen (Margit Magnusdóttir, 92.) – Heidi Sevdal, Malena Josephsen, Fríðrún Danielsen, Rannvá Andreasen (Rakul Magnussen, 87.) – Olga Kristina Hansen – Mona Breckmann
Á bonkinum: Bjarta O. Johansen, Anja Weyhe, Sólja T. Eiðisgarð, Rakul M. Johannesen, Ansy Sevdal
Gult kort: Heidi Sevdal, 48.
Venjari: Álvur Hansen
Dómari: Lilach Asulin (Ísrael)
Linjudómarar: Tzvia Malca (Ísrael) & Duncan Sultana (Malta)
Fjórðidómari: Esther Azzopardi (Malta)

**Endaliga støðan:**

| | | | | | | |
|---|---|---|---|---|---|---|
| 1 | Armenia | 3 | 1-2-0 | 2-1 | 1 | 5 |
| 2 | Malta | 3 | 1-1-1 | 2-3 | -1 | 4 |
| 3 | Georgia | 3 | 1-1-1 | 1-1 | 0 | 4 |
| 4 | Føroyar | 3 | 1-0-2 | 2-2 | 0 | 3 |